FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA



# Strategiætlan 2030

# Inngangur

Núverandi strategi, *Mál og mið 2020-2024*, hevur tænt sum leiðbeinari fyri strategiarbeiðið á Fróðskaparsetrinum í næstan fyra ár, og týðandi framstig eru gjørd á fleiri raðfestum mótum. Við hesum er strategiætlanin endurskoðað og dagførd fyri tíðarskeiðið 2025-2030.

Sum landsins einasta universitet hevur Fróðskaparsetur Føroya ein serligan og týdningarmiklan leiklut í føroyska samfelagnum. Fróðskaparsetrið stendur á tryggari grund við stuðli frá øllum politiskum flokkum í landinum. Fróðskaparsetrið hevur avgerandi týdning, tá ið tað ræður um eina vælútbúna arbeiðsmegi, og hevur síðani stovnan virkað sum hornasteinur í menningini av móðurmálinum.

Altjóða kappingin um lesandi harðnar, og Føroyar mugu varðveita sína atdráttarmegi, bæði tá ið tað snýr seg um føroyskan ungdóm, sum vil nema sær útbúgving og menna sínar arbeiðsmøguleikar, og tá ið tað ræður um útlendingar, sum kanska umhugsa eina framtíð í Føroyum. Sambært Hagstovu Føroya flyta umleið 40 prosent í hvørjum ættarliði úr Føroyum á ungum árum. Bara helvtin flytur heimaftur, tá ið tey gerast eldri, t.e., fimti hvør í hvørjum ættarliði býr ikki longur í Føroyum. Høvuðsavbjóðingin hjá Fróðskaparsetrinum komandi árini er tískil tvíføld:

**At nøkta átrokandi tørvir á gransking og hægri útbúgving í Føroyum *og* gerast ein samansjóðaður partur av altjóða akademiska samfelagnum.**

Eitt sterkt Fróðskaparsetur Føroya kann betra um búfestið hjá ungum føroyingum. Eisini kann Fróðskaparsetrið økja um arbeiðsmegina og granskingina á vitanartungum økjum, sum eru avgerandi fyri vøkstur og framburð í føroyska samfelagnum og fyri føroyska tjóðarbygging sum heild. Tí hevur Fróðskaparsetrið átrokandi tørv á at skapa ein haldgóðan grundvøll undir framhaldandi vøkstri og menning – í tøttum samstarvi við viðkomandi áhugapartar og við støði í núverandi granskingar- og útbúgvingarvirksemi á Fróðskaparsetrinum.

Dagførda strategiætlanin lýsir fyrst grundvøll og missión hjá Fróðskaparsetri Føroya, t.e. høvuðuppgávuna hjá Fróðskaparsetrinum, bæði frá einum føroyskum og altjóða sjónarhorni. Síðani verða strategisku súlurnar í strategiætlanini lýstar; hesar súlur umboða tey nýggju økini, sum Fróðskaparsetrið serliga vil menna komandi árini. At enda verða tey ítøkiligu strategisku málini í strategiætlanini lýst nærri.

# Grundvøllur og missión

Fróðskaparsetur Føroya er fyrst av øllum eitt universitet, sum er ein hægri útbúgvingarstovnur, ið bjóðar granskingargrundaðar útbúgvingar á altjóða stigi. Altjóða standardir og kjarnuvirði eru væl grundfest í akademiska heiminum og í Magna Charta Universitatum, sum Fróðskaparsetur Føroya skrivaði undir í 2021. Her verður staðfest, at eitt universitet eigur at hava andsfrælsi; eitt universitet eigur at luttaka við óheftari rødd í almenna kjakinum og hevur samstundis skyldu til luttaka í samfelagsligu og búskaparligu menningini. Sum lestrar- og arbeiðspláss skal universitetið vera eitt stað, har fjølbroytni, tollyndi, inklusjón, javnstøða og sínámillum virðing eru í hásæti.

Fróðskaparsetrið er eisini eitt *føroyskt* universitet og tað einasta føroyska universitetið. Í hesum liggur ein serlig skylda at viðvirka til menning av móðurmáli og mentan.








## Fortreytirnar fyri einum føroyskum universiteti eru hesar:

**Føroyska málið og tjóðarbygging**

Fróðskaparsetrið hevur serliga skyldu til at fremja og virka fyri gransking á hægsta stigi í føroyskum máli og mentan og at veita granskingargrundaða útbúgving í føroyskum máli og mentan. Í størri høpi hevur Fróðskaparsetrið ábyrgd av at varðveita og menna føroyskt mál og mentan víða hvar í føroyska samfelagnum – frá útbúgving og fyrisiting til fjølmiðlar og nýggja tøkni.

**Limaskapur í evropeiska økinum fyri hægri útbúgving (EHEA)**

Bolognatilgongdin hevur seinastu 25 árini sameint evropeisk lond og universitet í ein felags útbúgvingarligan karm, ið kallast evropeiska økið fyri hægri útbúgvingar (EHEA). Endamálið er at menna meira sambæriligar, kappingarførar og samanhangandi hægri útbúgvingarskipanir í Evropa. Føroyar – og harvið Fróðskaparsetur Føroya – mugu hava limaskap í EHEA og Erasmus+ fyri at tryggja lesandi, undirvísarum og granskarum smidligt altjóða flytføri.

### Granskingargrundað útbúgving

Við at vera lokkandi arbeiðspláss fyri gávuríkar granskarar, skal Fróðskaparsetrið veita munagóða og dygdargóða gransking, sum stuðlar undir læru og undirvísing. Granskingargrundað útbúgving er vørumerki fyri eitt og hvørt altjóða viðurkent universitet. Granskingarátøk eiga at stuðla undir heimsmálini hjá ST um burðardygga menning.

### Lesandi í miðdepilin og framkomið kampus

Fróðskaparsetrið eigur at hava eitt lærdómsumhvørvi, sum setir tann lesandi í miðdepilin og stuðlar undir allar liðir í lestrarlívinum. Fyri at standa seg væl innan- og uttanlands er av avgerandi týdningi, at Fróðskaparsetrið verður verandi ein góður og hugkveikjandi lestrar- og arbeiðsstaður.
Eitt framkomið kampus er avgjørd fortreyt fyri at styrkja læruvirksemi og akademiska/sosiala integratión og fyri at draga at sær framtíðar lesandi, undirvísarar, granskarar og samstarvsfelagar. Nøktandi og tøkir lestrarbústaðir eru somuleiðis ein avgjørd fortreyt.

### Nútímans og professionelt Setur

Fróðskaparsetrið eigur at vera vælskipað, nøktandi fíggjað, hava dugnalig fyrisitingarlig starvsfólk og nútímans talgild amboð (t.d. vitlíki), sum stuðla leiðslu og virksemi. Professionell leiðsla, inkluderandi arbeiðsmentan og ansurin fyri trivnaði eru grundarlag undir einum vælvirkandi Fróðskaparsetri.



Missiónin hjá Fróðskaparsetri Føroya er:

**At veita dygdargóðar og granskingargrundaðar hægri útbúgvingar á altjóða stigi, ið føroyska samfelagnum tørvar.**

**At fremja dygdarmikla gransking, serliga slíka, ið er viðkomandi fyri føroyska samfelagið, men eisini fyri altjóða akademiska samfelagið.**

**At luttaka í almennum kjaki og samstarva við almennar og privatar stovnar um útbúgvingar-, granskingar- og menningarátøk, sum hava týdning fyri føroyska samfelagið.**

# Strategiskar súlur

Við einum sterkum grundvølli kann Fróðskaparsetrið menna nýggj átøk, sum hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Tey nýggju átøkini bólka seg saman um tríggjar strategiskar súlur, sum kunnu skoðast sum leiðarstjørnur í framtíðar menningini av Fróðskaparsetrinum.



### STRATEGISK SÚLA I: Menna gransking og hægri útbúgving, sum hevur týdning fyri megingeirar í Føroyum

Fróðskaparsetrið hevur skyldu til at nøkta átrokandi tørvir á vitan í føroyska samfelagnum. Nakrar av stóru avbjóðingunum fyri framman eru veðurlagsbroytingar og menning av burðardyggum loysnum, hóskandi nýtsla av tøkni (t.d. vitlíki) og trygdarviðurskifti (t.d. nettrygd).

Tøkni spælir alsamt størri leiklut í fiski- og alivinnuni, sum hava tørv á framkomnum førleikum í verkfrøði. Hartil verður hildið, at møguleikarnir eru stórir hjá fiski- og alivinnuni at fáa meira virði burtur úr lívfrøðiliga tilfeinginum úr sjónum og hartil eisini størri menning av matvøruvirðisketuni. Meira menning krevur tvørfakligt samstarv, viðkomandi gransking og hægri útbúgving í matvøruvísindum, lívfrøði, biotøkni, verkfrøði og búskaparfrøði/handilsskapi. Aðrir føroyskir privatir megingeirar, ið hava serligan tørv á viðkomandi gransking, eru byggivinnan, ferðavinnan, grøn orka og flutningur.

Í samstarvi við viðkomandi áhugapartar vil Fróðskaparsetrið stremba eftir at leita sær fígging til at menna granskingarførleikar á viðkomandi akademiskum økjum og at menna tilhoyrandi granskingargrundað útbúgvingartilboð.

### STRATEGISK SÚLA II: Geva nýggjum málbólkum útbúgvingartilboð og styrkja altjóða virksemið

Í dag eru so at siga øll lesandi á Fróðskaparsetrinum føroyingar (ella útlendingar, sum eru búsitandi í Føroyum), og tað mesta av undirvísingini fer fram á føroyskum.

Nógvir føroyingar millum 18 og 22 ár leita sær framvegis av landinum at fáa sær universitets-útbúgving. Tað snýr seg um útbúgvingar, sum mong spyrja eftir, og har Fróðskaparsetrið bert í avmarkaðan mun ella als ikki hevur útbúgvingartilboð, so sum lestur í handilsskapi, verkfrøði og læknavísindum. Men tað snýr seg eisini um útbúgvingar, har nógv longu fara á Fróðskaparsetrið at lesa, t.d. námsfrøði og sjúkrarøktarfrøði.

Fróðskaparsetrið vil stremba eftir at gera skaran av lesandi størri og breiðari við at bjóða nýggjum málbólkum viðkomandi útbúgvingar og lokkandi lestrarumhvørvi – og at bjóða út útbúgvingar-tilboð, sum eisini eru áhugaverd fyri altjóða lesandi.

### STRATEGISK SÚLA III: Menna nýggj sløg av útbúgvingum og nýggjar útbúgvingarhættir

Miðalaldurin á lesandi á Setrinum er lutfalsliga høgur, og stórur partur av studentahópinum hevur familjuskyldur (børn undir 18 ár, bústaðarlán o.s.fr.). Tískil noyðast tey flestu at arbeiða í lestrartíðini fyri at tryggja sær neyðugu inntøkuna, hóast tey eru innskrivað sum fulltíðarlesandi og væntað verður av teimum, at tey brúka meginpartin av síni tíð til lesturin. Fyri nøkur er hetta ein avbjóðing, sum kann hava fráfall við sær.

Fróðskaparsetrið vil stremba eftir at bjóða lesandi størri smidleika og hava fleiri útbúgvingartilboð, sum samsvara við smidligar útbúgvingarleiðir og lívlanga læring.

# Strategisk mál

Í tíðarskeiðinum 2025-2030 setir Fróðskaparsetrið sær hesi strategisku mál:

### 1. Allar útbúgvingar á Fróðskaparsetrinun eru góðskutryggjaðar í samsvari við bolognatilgongdina

Føroyar eiga skjótast gjørligt at fáa limaskap í EHEA og Erasmus+. Hetta fer at tryggja lesandi, undirvísarum og granskarum á Setrinum smidligt altjóða flytføri. Í hesum sambandi skulu allar útbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum vera góðskutryggjaðar og -mentar við politikkum og mannagongdum, sum eru í samsvari við bolognatilgongdina.

### 2. Allar útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum eru granskingarliga væl rótfestar

Flestu útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum eru granskingarliga væl rótfestar, men vegna akademiska siðvenju tørvar Setrinum framvegis at menna granskingina á summum útbúgvingarøkjum, t.d. sjúkrarøktarfrøði, lærarautbúgving og námsfrøði. Fróðskaparsetrið skal gera egna lýsing av, hvat granskingargrundað útbúgving merkir og seta ítøkilig mál fyri menning av granskingini á einstøku útbúgvingarøkjunum.



### 3. Hægri útbúgving og gransking í føroyskum máli og bókmentum er framtíðartryggjað, og máltøknidepilin er ein dyggur og virkin pallur undir føroyskari máltøkni

Fróðskaparsetrið vil menna útbúgvingina í føroyskum við at hava eitt fjøltáttað skeiðsútboð, sum samsvarar við avbjóðingarnar í føroyska samfelagnum, og tryggja eitt støðugt og munandi tal av umsóknum til útbúgvingina. Gransking í føroyskum við verkætlanum, sum røkka út í onnur granskingarumhvørvi innan- og uttanlands, skal styrkjast. Samstørv skulu mennast, sum kunnu styrkja støðið undir máltøknideplinum og lata upp fyri verkætlanum og máltøkniligum loysnum í einum støðugt meiri altjóðagjørdum og fleirmæltum føroyskum gerandisdegi.



### 4. Vitanardeplar eru skaptir á økjum, sum hava týdning fyri megingeirar í Føroyum

Fleiri týdningarmiklir megingeirar í Føroyum hava brúk fyri viðkomandi gransking og hægri útbúgving – við atliti at burðardyggari menning av føroyska samfelagnum. Ein vitanardepil er eitt samstarv um gransking, menning og nýskapan millum innanhýsis og uttanhýsis áhugapartar á økjum, sum hava serliga stóran týdning fyri megingeirarnar í Føroyum. Fróðskaparsetrið vil seta á stovn ein vitanardepil í matvøruvísindum og biotøkni, og ein vitanardepil í námsfrøði og skúlagransking. Eisini vil Fróðskaparsetrið menna vitanardeplar, sum eru viðkomandi fyri byggivinnuna, ferðavinnuna, grøna orku og flutning. Samstarvið við Sjúkrahúsverkið um heilsugransking skal styrkjast og mennast.







## 5. Fróðskaparsetrið bjóðar út nýggjar ella dagførdar útbúgvingar til ungar føroyingar

Fróðskaparsetrið vil byggja brúgv til miðnám og til Hægri nám á Glasi, soleiðis at fleiri ungir føroyingar, sum annars høvdu farið av landinum, søkja sær hægri útbúgving í Føroyum. Útbúgvingarnar á Setrinum í verkfrøði og handli/virkisbúskapi skulu dagførast og mennast. Eisini vil Fróðskaparsetrið stremba eftir at bjóða út nýggjar útbúgvingar í matvøru- og heilsuvísindum. Atgongd til lestrarbústaðir er avgerandi fyri bæði føroysk og útlendsk lesandi.

## 6. Altjóða virksemið á Fróðskaparsetrinum er økt

Fróðskaparsetrið vil økja um flytførið av lesandi til og úr Føroyum – serliga lesandi, sum fara úr ella koma til Føroya eina lestrarhálvu. Undirvísingin á viðkomandi skeiðum skal vera á enskum. Ein fortreyt fyri, at Fróðskaparsetrið kann menna altjóða virksemið er, at Føroyar gerast limur í Erasmus+, og at altjóða lesandi hava atgongd til lestrarbústaðir og fáa stuðul frá einari altjóða skrivstovu á Setrinum.

## 7. Fleiri tilboð um lívlanga læring og størri smidleiki til tey, sum hava tørv á tí

Fróðskaparsetrið eigur at vera smidligt fyri lesandi, sum veruliga hava tørv á tí, men á ein skipaðan og vælgrundaðan hátt, sum fylgir prinsippunum um lívlanga læring og smidligar útbúgvingarleiðir. Fróðskaparsetrið eigur í nógv størri mun at bjóða stakskeið, sum kann vera fyrsta stig móti at taka eina útbúgving. Hetta kann skipast sum ein depil fyri lívlanga læring, t.d. undir heitinum "Opið Setur". Bæði undirvísing á staðnum og talgild fjarundirvísing eigur at verða brúkt. Allar masterútbúgvingar skulu bjóðast út bæði sum fulltíðar- og parttíðarlestur. Einstakar útbúgvingar á bachelorstigi skulu bjóðast út sum bæði fulltíðar- og parttíðarlestur, t.d. í námsfrøði. Møguleikin fyri at taka valskeið tvørtur um útbúgvingarmørk – og tilhoyrandi altjóða samstørv – skulu mennast.

## 8. Fróðskaparsetrið hevur fingið ein nýggjan felagsbygning, og menningin av kampus heldur fram

Felagsbygningur til Fróðskaparsetrið verður helst liðugur í 2028, samstundis sum umvælingin av Frælsinum 20 er komin væl áleiðis. Hereftir verður væntandi farið undir næstu stigini í kampusætlanini. Tað er umráðandi, at Fróðskaparsetrið kann bjóða lesandi og starvsfólki lokkandi karmar um lestrarlívið við kappingarførum kampushølum og hentleikum, hóskandi lestrarbýli, barnaansing, lestrarstudningi og vegleiðing. Komandi kampus skal vera burðardygt á hægsta stigi, bæði tá tað kemur til bygging og eftirfylgjandi rakstur, og viðkomandi granskingarverkætlanir skulu vera tengdar at kampusætlanini.

## 9. Fróðskaparsetrið hevur eina sterka og professionella fyrisiting, sum kann stuðla undir strategisk átøk

Tá ið tað snýr seg um gransking og undirvísing hevur tað avgerandi týdning, at neyðugi fyrisitingarligi og tekniski stuðulin er tøkur, og at Fróðskaparsetrið ikki fer undir nýggj átøk, uttan at neyðuga fíggingin er tøk. Fróðskaparsetrið hevur arbeitt miðvíst við at menna fyrisitingina: Til dømis eru Góðskueindin og Granskingar- og framtakseindin settar á stovn, eins og lestrarfyrisitingin er miðsavnað, so lesandi á ymisku deildunum hava sama tænastustig. Tó er neyðugt áhaldandi at tryggja, at fyrisitingin verður raðfest, so hon kann veita tær tænastur, sum lesandi og starvsfólk hava tørv á. KT-infrakervið skal styrkjast, so tað stuðlar best møguligt undir gransking,  undirvísing og fyrisiting á Fróðskaparsetrinum.



## 10. Fróðskaparsetrið hevur eitt gott umdømi og kann draga at sær góð starvsfólk

Ein fyritreyt fyri framhaldandi menningini av Fróðskaparsetrinum er, at vit kunnu draga at okkum og fasthalda bestu starvsfólk (bæði føroyingar og útlendingar). Tað er umráðandi, at vit miðvist arbeiða við at gera Fróðskaparsetrið til eitt gevandi arbeiðspláss, har trivnaður, javnstøða og arbeiðsumstøður annars eru á hægsta stigi. Vit mugu arbeiða miðvíst við brandingini av Fróðskaparsetrinum, so vit eru sædd sum eitt lokkandi stað at arbeiða og lesa.



FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA